# KÍ-venjarin kunngjørdur í vikuni

Jóhann Lutzen, sum situr í leiðsluni í KÍ, staðfestir á heimasíðuni hjá Bláu Bylgjuni, at venjarin fyri komandi kappingarár verður kunngjørdur í vikuni. - Venjarin skal skapa eitt lið, har felagsandin skínur ígjøgnum og har menn kempa við stoltleika fyri Klaksvíkar Ítróttarfelag. Soleiðis sigur Jóhann Lutzen, sum situr í leiðsluni í KÍ, við heimasíðuna hjá Bláu Bylgjuni. Hann staðfestir á fjepparasíðuni, at nýggjur venjari verður kunngjørdur í vikuni.

# TB-nevndin mynstrar av

Næsta sunnudag verður árligur aðalfundur hjá Tvøroyrar Bóltfelag. Og tað verða ikki hissini broytingar í nevndunum eftir tað. Suðuroyarportalurin skrivar, at allar nevndirnar í Tvøroyrar Bóltfelag hava boðað frá, at eingin nevndarlimur heldur fram. - Um sjálvur aðalfundurin ikki verður viðtøkuførur, so verður lýst til eykaaðalfund hálvan tíma seinni, sigur Jóan Petur Olgarsson við Suðuroyarportalin. Jóan Petur Olgarsson hevur seinnu árini verið formaður í TB, men hann hevur eisini valt at leggja frá sær.

# Fótbólts-veitsla í Miðla-húsinum

**Fríggjakvøldið verða bestu spælararnir hetta kappingarárið kosnir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta er 10. ferð, at Sosialurin er við til at kjósa bestu spælararnar í føroysku fótbóltskappingini.

Sum vant, so verða tað venjarar, liðformenn og umboð fyri fjølmiðlarnar, sum kjósa hesi.

Nú talan er um tíggjunda árið, ger Miðlahúsið eyka nógv burtur úr gallakvøldinum.

Umframt at kjósa tey fremstu, verður Miðlahúsið eisini karmur um tríggjar tímar við fótbóltshugna, - reypi og –prátið, og eftir hetta verða tey luttakandi eisini boðin á dansistaðið Rex, har tað so verður upp til tey einstøku at hugna sær víðari.

Atgongd til tiltakið er ókeypis, men spælarar, venjarar og onnur, sum hava tilknýti til fótbóltin, verða tó biðin um at boða frá luttøku við at senda teldubræv til fotboltsveitsla@sosialurin.fo.

Á veitsluni verða ársins stjørnuskot, ársins venjarar, ársins málverjarar og ársins spælarar kosin hjá monnum og kvinnum. Hartil verður ársins dómari í Formuladeildini kosin, eins og bestu málskjúttarnir fáa gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti. Og endaliga verður tað liðið, sum hevur sýnt besta fótbóltin í ár, eisini kosið.




*Fríggjadagin klokkan 21 byrjar fótbóltsveitslan í Miðlahúsinum*

## Spælararnir valdu Ronaldo

**Altjóða spælarasambandið, FIFPro, hevur kosið Cristiano Ronaldo sum ársins spælara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani 2005 hevur altjóða spælarasambandið, sum hevur fleiri enn 50.000 limir, kosið ársins spælara. Í fjør fall heiðurin til brasilska Kaka úr AC Milan, og ikki óvæntað gjørdist tað í ár Cristiano Ronaldo úr Manchester United, sum fekk heiðurin. Hetta eftir eitt ár, har hann saman við Manchester United vann bæði Premier- og Champions League, og har Ronaldo við sínum 42 málum átti sín stóra lut í heitunum.

Eisini hevur FIFPro sett ársins lið, og telur hetta fimm spanskar europameistarar. Sermerkt við liðnum er annars, at hetta bert telur ein spælara úr italsku Seriu A, meðan hinir tíggju eru úr sponsku La Primera og ensku Premier League.

Liðið hjá FIFPro sær soleiðis út: Iker Casillas (Real Madrid) – Sergio Ramos (Real Madrid), John Terry (Chelsea), Rio Ferdinand (Manchester United), Carlos Puyol (Barcelona) – Steven Gerrard (Liverpool), Kaka (AC Milan), Xavi (Barcelona) – Lionel Messi (Barcelona), Fernando Torres (Liverpool), Cristiano Ronaldo (Manchester United).

# Aftur ein stórsigur til føroysku kvinnurnar

**Føroyska kvinnulandsliðið hevur skorað 10 mál í tveimum dystum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Føroyska kvinnulandsliðið gjørdi aftur eitt bragd í gjár, tá tær vunnu 6-2 á Luksemborg yviri í Litava. Um vikuskiftið vunnu føroysku kvinnurnar 4-1 á vertslandinum, Litava.

Dysturin endaði 6-2 eftir 3-1 í hálvleikinum. Føroysku kvinnurnar vóru - hóast summir av spælarunum máttu melda frá vegna sjúku - suverent nógv betur enn liðið úr Luksemborg.

Hetta er fyrstu ferð, at eitt føroyskt landslið í einari kapping, sum er fyriskipað av UEFA ella FIFA skorar 10 mál í tveimum dystum.

Stóri málslúkurin í gjár var unga Mona Breckmann úr AB. Mona, sum spældi sín fyrsta A-landsdyst, tá hon varð skift inn móti Litava leygardagin. Og sigast má, at Mona hevur tikið av møguleikanum hon hevur fingið. Hesa feðr við einum flottum hattrick'ið. Heidi Sevdal fekk tvey mál, og veteranurin, Malena Josephsen fekk eitt mál. Av sonnum eitt flott avrik.

**Málskjúttarnir vóru hesir:**
1-0 4´ Heidi Sevdal
2-0 6´ Mona Breckmann
2-1 20´
3-1 42´ Heidi Sevdal
4-1 53´ Mona Breckmann
4-2 72´
5-2 77´ Mona Breckmann
6-2 78´ Malena Josephsen
(br.)